# Nógvar Føroyamyndir á Eurosport.com

Eurosport er spakuliga við at gerast ein av bestu ítróttarmiðlunum á alnetinum eftir at vera farin í samstarv við Yahoo. Eisini Føroyar fær gott pláss á síðuni Á eurosport.com liggja ikki færri enn 38 myndir frá dystinum millum Føroyar og Skotland á Svangaskarði. Myndasavnið liggur á: eurosport.yahoo.com/ph/?p=scotland+faro



# Henrik heldur fram

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, veit nú, hvat hann skal takast við næsta árið. Henrik hevur verið venjari hjá Køge í næstbestu deildini seinasta árið, og nú er sáttmáli skrivaður um samstarv í eitt ár afturat. Á vøllinum gekk tað ógvuliga væl undan vetrarsteðginum. Tá var Køge millum feløgini, sum kappaðust um uppflytingarplássini. Í vetur var stórur fíggjarligur turbolensur í og kring felagið, sum var um reppið at fara á heysin. Ein loysn varð funnin á trupulleikunum, so felagið slapp undan húsaganginum. Eitt tíðarskeið sást fíggjarliga órógvið aftur á vøllinum. Men nú hevur aftur gingið væl í eina tíð. Í dag vann Køge 2-0 á heimavølli ímóti HIK, sum er aftast við 23 stigum – eitt stig aftanfyri Fremasd Amager. Hóast turbolensin í vetur og í vár er Køge nummar seks við 44 stigum.

B36-NSÍ 1-1 (1-0):

# B36 tók ikki av

*B36*

*NSÍ*

**Fyrstu trý korterini hevði B36 allar kjansir at avgera dystin. Tað eydnaðist tó ikki at punktera NSÍ, sum eftir steðgin stríddi seg upp á javnt**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*

B36 hevur neyvan spælt betri í ár, enn teir gjørdu fyrra hálvleik í Gundadali sunnudagin. Í góðveðrinum varð NSÍ snøgt sagt sópað av vøllinum, tá væl uppløgdu heimamenninir nýttu bæði breidd og dýpd í álopsspælinum, eins og teir við einum krútsterkum miðvølli vunnu mest sum allar returbóltar.

At tað ikki eydnaðist teimum at fáa meira enn tað eina málið, kunnu teir bert takka sær sjálvum fyri. Bæði Bergur Midjord og Sylla áttu sínar møguleikar, eins og talan í fleiri øðrum førum varð um heilar og hálvar kjansir.

Einsamalla málið mátti Jens Martin Knudsen taka á sín kappa. Hann metti skeivt, tá hann fór út eftir longum bólti, og tá Hanus Thorleifsson var fyrri á hesum, noyddist veteranurin at toga mótspælaran niður. Einasta merkisverda við dóminum var, at Jens Martin ikki fekk kort fyri hendingina.

## Lyklaspælarar fóru út

Brotssparkið setti Mikkjal Thomassen í netið við einum dundurskoti, og so søkti heimaliðið eftir næsta málinum. Neyvan hevði nakar mótmælt, um Fróði Benjaminsen fekk brotsspark, tá hann varð felduri gjøgnumbrotsroynd, men eins og í dystinum annars, so var tað nær við og næstan hjá B36.

Og tað kostaði dýrt, at B36 ikki fekk tikið av møguleikunum. Gjøgnum seinna hálvleik roynd NSÍ miðvíst at arbeiða seg alt meira inn í dystin. At ein útlúgvaður Sylla noyddist av vøllinum dróg nógvar tenn úr kontraspælinum hjá B36, og tá so Fróði Benjaminsen varð skumpaðurniðan, samstundis um Mikkjal varð skiftur út, fekk NSÍ brádliga tak um miðvøllin.

Sæð í so væl kenda bakspeglinum, so er einki at ivast í, at B36 bakkaði ov langt eftir hæli seinastu løtuna. Møguliga var orkan eisini farin at ganga undan í nógva hitanum, og í øllum førum gekk meira og meira fyri seg framman fyri málinum hjá Jákupi Mikkelsen.



*Hjalgrím Elttør var ein av spælarunum, sum veruliga spruttaði, tá NSÍ legði trýst á. Her er hann í nærdysti við Klæmint Matras*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Serstakliga var talan í fleiri førum um vandamiklar deyðbóltar, og upp á ein av hesum eydnaðist eisini NSÍ at javna. Eitt mál, sum Jákup Mikkelsen mundi eiga sín lut í.

## Lykladystur í Runavík

Javnleikurin bar við sær, at bæði liðini løgdu seg ájavnt EB/Streymi í oddinum á talvuni. Og hetta kunnu runavíkingar helst vera best nøgdir um. Eisini hóast teir kansku kundu tikið alt, var hepnið av álvara við teimum. Men teir mundu tó fegnast um, at Fróði Benjaminsen rakti skeivu megin stólpan einar tríggjar minuttir inn í yvirtíðina.

Higartil hevur tað fyri tað nógva eydnast hjá vespunum at halda taktina við hini oddaliðini, og megna teir at taka trý stig, tá teir fáa vitjan av HB komandi vikuskiftið, fer tað at síggja heilt spennandi út.

Hjá B36 mundi tað hinvegin kennast, sum høvdu teir tapt tvey heldur enn vunnið eitt stig. Gaman í lyfti javnleikurin teir upp á oddasessin, men ivaleyst munnu teir svørt/hvítu hugsa meira um, at teir við sigri kundu leggja seg einsamallar á odda.

Ivaleyst fer Kurt Mørkøre eisini at seta skotvenjing á skránna komandi vikuna. Tí við somikið stórari yvirvág eigur effektiviteturin hjá einum oddaliði at vera størri.

# Ov heitt

Hóast hann í heimlandinum, Serbia, ofta man hava spælt í nógvum hitastigum, so puffaði Nenad Stankovic hjá NSÍ um hitan, sum var sunnudagin.

- Tað var ov heitt hjá okkum at spæla. Nú havi eg spælt í Føroyum í fýra ár, og tí havi eg vant meg við veðurlagið her. Í dag var tað næstan, sum spældi eg aftur í Serbia, helt hann fyri.

Um dystin sjálvan helt miðvallarin, at tað var nøktandi hjá NSÍ, at teir fingu ein javnleik burturúr.

- Hetta var ein sera týðandi dystur fyri okkum. Og kanska ávirkaði hetta eisini nervarnar hjá okkum í fyrra hálvleiki, har vit einki fáa at hanga saman.

Men tit megna kortini at venda gongdini. Hvat broyttu tit eftir steðgin?

- Vit fóru longur fram á vøllin. Vit vóru aftanfyri, og tí noyddust vit fram. Og eg haldi eisini, at hetta vísur eina ávísa styrki á liðnum hjá okkum. Eg haldi, at hetta er fjórða ferðin í ár, at vit koma aftur, hóast vit hava verið aftanfyri.

Komandi vikuskiftið skulu tit spæla móti HB. Tað er væl ein dystur, sum er eins týðandi hjá tykkum?

- Sjálvandi. Men tað er so ein nýggj uppgáva, sum vit tá fara undir. Men sjálvandi vilja vit eisini royna at fara eftir sigrinum í tí dystinum.

**-mørk**

# Skuldu avgjørt dystin

Fróði Benjaminsen var als ikki nøgdur um, at tað ikki eydnaðist B36 at vinna dystin móti NSÍ.

- Teir liggja afturi á vøllinum í bíða, men so leingi sum vit halda ferðini uppi, sita vit á øllum. Eg haldi ikki, at teir skapa ein tann einasta møguleika í 60 minuttir. Men tá teir fáa drigið ferðina niður, gongur galið hjá okkum.

Tit komu undir stórt trýst seinastu løtuna. Bakkaðu tit ov nógv?

- Tað gjørdu vit kanska. Tað gevur teimum pláss at koma longur fram á vøllin, og tað fáa teir so gjørt sær dælt av at enda. Men tað er irriterandi, at vit bert fingu javnt, tá vit høvdu allar kjansir at punktera dystin í fyrra hálvleiki.

**-mørk**